# Pedagogar og hjálparfólk til Fuglafjarðar

**Pedagogar og hjálparfólk**
Søkt verður eftir pedagogum og hjálparfólkum til vøggustovu, barnagarð og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu.

- Eitt pedagogstarv á 30 t. viku í barnagarðsstovu
- Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í vøggustovu
- Eitt hjálparfólkastarv á 20 t. viku í vøggustovu
- Eitt pedagogstarv  á 35 t. viku at arbeiða við sertørvi  í stovnum hjá Fuglafjarðar kommunu

Størvini verða sett frá 01.08.2008 ella eftir  nærri avtalu.

**Tíðaravmarkað størv í vøggustovu vegna barnsferð.**

- Eitt. pedagogstarv á 30 t. viku í tíðarskeiðnum 01.08.2008 til og við 31.12.2008
- Eitt hjálparfólkastarv á 30 t. viku  í tíðarskeiðnum 01.08.2008 til 30. 04. 2009

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Frá 01.08.2006 er dagstovnurin ætlaður 76 børnum, tí at stovnurin varð víðkaður við eini barnagarðsstovu.

**Vit sóknast eftir pedagogum og hjálparfólkum:**

- ið kunnu arbeiða sjálvstøðugt, og eru før fyri at orða seg væl skrivliga
- hava fakliga vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðinum
- hava umsorgan fyri børnunum
- eru eldhugað og jalig
- hava góð samstarvsevnir
- síggja møguleikar fram um mørk

**Vit kunnu bjóða tær:**

- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- eitt starv, har tú kanst brúka tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- samstarv við NSR tænastu, náms- og sálarfrøðilig ráðgeving, sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu

**Setanartreytir**
Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í dagstovninum Julionnu Næs á tlf 737780.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera Býráðskrivstovuni, Norður í Gerði 10b, 530 Fuglafjørður
í hendi í seinasta lagi 2. juni 2008.

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 23. Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknir ella onga at taka.

**Fuglafjarðar kommuna**



# AÐALFUNDUR

Boða verður frá, at aðalfundur í Badminton Samband Føroya, B.S.F., verður í ÍSF húsinum hósdagin hin 19. juni kl. 1800. Skrá sambært viðtøkum felagsins.

Nevndin



# Bátastevna í Vestmanna

Leygardagin 24. mai verður árliga Bátastevnan í Vestmanna, tann besta og størsta Bátastevnan, har bátar og smærri før úr øllum Føroyum seta hvørjum øðrum stevnu.

**Tiltøk fyri børnum á Bátastevnuni**
Dreingir hjá VÍF hava hesi tiltøk í høllini í Vestmanna 24. mai frá kl. 16 til 19

- Fiskibrunnur
- Tombola
- Kasta eftir blikkum
- Andlitsmáling
- Fartmátari
- Hoppiborg
- Pílakast eftir balónum
- Søla av kaffi, lagkaku, pylsubreyð og sodavatn



# Ólavsøkan 2008

Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað. Umsóknarblaðið fæst í Snarskivuni og á heimasíðu kommununnar.

Freistin at lata inn umsóknarblaðið er sett til fríggjadagin 20. juni 2008 kl. 16.00.

Umsóknir, sum koma inn eftir 20. juni 2008 kl. 16.00, verða ikki viðgjørdar.

**Tórshavnar kommuna**

